# Strategiskjal fyri Føroya læraraskúla

## Søguligt baksýni

Strategiarbeiðið á Føroya Læraraskúla gongur aftur til PLÚ álitið, sum varð handað landsstýrismanninum í mentamálum í august 2006. Álitið snúði seg um, hvat innihaldið í pedagogútbúgvingini og læraraútbúgvingini í framtíðini skuldi vera, og hvussu útbúgvingarnar skuldu skipast.

Við støði í álitinum setti landsstýriskvinnan í mentamálum í februar 2008 innanhýsis nevnd í Mentamálaráðnum við tí arbeiðssetningi at gera uppskot til nýggja lóg um pedagogútbúgving og læraraútbúgving. Seinni varð arbeiðssetningurin broyttur soleiðis, at talan í staðin fyri um lógaruppskot skuldi vera uppskot um kunngerð fyri útbúgvingarnar báðar.

Løgtingslógin um læraraútbúgving í Føroyum er frá 28. mai 1980. Kunngerðirnar um læraraútbúgving og pedagogútbúgving hava báðar verið við heimild í hesi lógini. Tann um læraraútbúgving er frá 7. mai 1991, og tann um pedagogútbúgving er frá 24. januar 1990.

Í november 2009 varð nýggj kunngerð um læraraútbúgving og pedagogútbúgving lýst. Henda kunngerðin er við heimild í lóg um Fróðskaparsetur Føroya, sum varð samtykt 9. juni í 2008. Løgtingslógin um læraraútbúgving í Føroyum frá mai 1980 er framvegis galdandi. Ætlanin er, at partar av henni skulu strikast so skjótt, sum tað ber til. Ætlanin er, at lógin skal strikast fult og heilt, tá ið tey læraralesandi, sum vórðu tikin inn á útbúgvingina í august 2007 hava lokið prógv í juni 2011.

Sambært grein 22 í lógini frá 1980 er ein venjingarskúli knýttur at Læraraskúlanum. Lógargreinin sigur, at upplæring teirra lesandi skal lutvíst vera á hesum venjingarskúla. Nú lógin frá 1980 verður strikað, verður einki formligt samband millum Læraraskúlan og Venjingarskúlan.

Tey, sum vórðu tikin inn á útbúgvingarnar í august 2008, vórðu tikin inn sambært grein 14 í lógini frá 1980. Henda greinin gevur heimild fyri royndarvirksemi og námsfrøðiligum menningararbeiði. Tey, sum vórðu tikin inn á útbúgvingarnar í august 2009, vórðu tikin inn sambært somu grein 14. Tá ið nýggja kunngerðin varð lýst 13. november 2009 gjørdist lóg um Fróðskaparsetur Føroya frá 9. juni 2008 og kunngerðin frá 13. november 2009 um læraraútbúgving og pedagogútbúgving formliga grundarlagið undir útbúgvingunum báðum.

## Skipan av strategi arbeiðnum

Á Læraraskúlanum eru 25 lærarar í starvi. Teir hava allir havt møguleika at verið við í arbeiðnum við hesum strategiskjali.

Roynt hevur verið at fáa tey lesandi at luttaka. Ráð teirra lesandi hevur áður – av og á – verið virkið á Læraraskúlanum. Seinastu trý árini eru fleiri royndir gjørdar fyri at kveikja lív í aftur ráðið, men

tað hevur ikki eydnast. Ráðið hevði annars verið upplagdi pallurin at samskift við tey lesandi um hetta arbeiðið.

Síðani á heysti í 2009 hevur Læraraskúlin havt samband við hinar deildirnar á Fróðskaparsetrinum. Vit hava vitjað á Søgu- og samfelagsdeildini og á Føroyamálsdeildini, og vit hava havt vitjan av umboðum fyri hesar báðar deildirnar og eisini Náttúruvísindadeildina og Sjúkrarøktarfrøðiskúlan. Stjórin á Granskingarráðnum hevur vitjað á Læraraskúlanum og kunna um arbeiðið hjá ráðnum og um møguleikar fyri stuðli til gransking.

Læraraskúlin hevur í arbeiðnum við at fyrireika nýggjar útbúgvingar havt samband við Kénnaraháskúla Íslands, sum síðani í juni 2008 hevur verið partur av Háskúla Íslands. Vit hava vitjað í Reykjavík, og vit hava havt vitjan úr Íslandi. Vit hava havt samband við Danmarks Pædagogiske Universitet. Vit hava vitjað á DPU, og vit hava havt vitjan frá DPU. Vit hava vitjað á institut fyri psykologi og uddannelse á Roskilde Universitet, og vit hava havt vitjan av útbúgvingarmennarum, sum hava samstarv við RUC.

## Útbúgvingar

### Útbúgving og skipan

Hjálagt er yvirlit yvir høvuðsútbúgvingarnar báðar – pedagogútbúgvingina og læraraútbúgvingina – skjal 1. Treytin fyri at gerast lærari ella pedagogur er lestur í 4 ár. Í báðum førum verður B.Ed. uppgáva skrivað móti endanum á triðja árinum. Fjórða árið er diplomár, sum tað er treyt at lesa, um rætturin at arbeiða sum lærari ella pedagogur skal fáast.

Allur lestur á Læraraskúlanum er skipaður í modulum. Undirvísingartímatalið er 10-15 um vikuna. Umframt undirvísingina skulu tey lesandi møta til vegleiðing, ið er roknað til ávíst minutttal fyri hvørja lestrarviku – sí hjálagda skjal 2.

Ein lærgugrein ella eitt skeið er á skránni í senn. Øll skeið og allar lærugreinar eru lýst í ECTS skeiðslýsingum, og tey enda øll við próvtøku. Øll lesandi skulu eftir hvørja próvtøku møta til persónliga eftirmeting, sum verður givin sambært hjálagda frymli – sí skjal 3. Tey lesandi eftirmeta øll skeið og allar lærugreinar. Eftirmetingarnar hjá teimum lesandi verða viðgjørdar eftir fastlagdari mannagongd.

Í løtuni lesa 259 til lærara ella pedagog. Møguleiki er fyri, at talið innan tvey ár verður økt til 300.

Í PLÚ álitinum verður nevnt, at útbúgvingarnar til pedagog og lærara í framtíðini eiga at verða skipaðar sum 5 ára masters útbúgvingar. Soleiðis er tað í Finnlandi, og soleiðis eru tey í Íslandi í holtur við at skipa sínar útbúgvingar. Henda áskoðanin er eisini kend hjá okkum, men í løtuni verður tað ikki hildið ráðiligt at skipa útbúgvingarnar soleiðis. Spurningurin eigur at verða tikin upp aftur um eini 5-7 ár. Tó er ætlanin innan 2-3 ár, at Læraraskúlin skal bjóða M.Ed. tilboð. Haraftrat er ætlanin næstu 2-3 árini, at lesandi á Læraraskúlanum skulu fáa møguleika at lesa M.Ed. á øðrum deildum á Fróðskaparsetri Føroya ella á onkrum av omanfyri nevndu lærdu háskúlum.

Út frá samrøðum við tey lesandi verður roknað við, at ein brotpartur av teimum lesandi fer at fara undir M.Ed. lestur beinleiðis eftir B.Ed. prógv. Millum tey lesandi tykist hugburðurin vera, at vera, at møguleikin fyri víðari lestri verður umhugsaður 2-4 ár eftir lokið prógv.

EftirútbúgvingarÍ nýggju útbúgvingunum er starvslæran skipað sum tættari partur av sjálvum lestrinum. Harvið skal starvslæran telja við í tíðini, sum ECTS lýst skeið og lærugreinar fevna um. Hetta ber við sær, at tað er neyðugt við útbúgving av starvslærulærarum, sum ber trygd við sær fyri, at starvslæran er á tí støði, sum tað sambært ECTS lýsingunum verður roknað við. Tað er alneyðugt, at tað verður farið undir hesa útbúgving í 2010/2011.
Møguleikin fyri at starvslæraraútbúgvingin verður fyriskipað saman við Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum verður kannaður.

Eftirspurningurin eftir ískoytisútbúgving fyri pedagogar og lærarar fyri at røkka B.Ed. støði er stórur. Samtykt er at hetta tilboðið skal bjóðast pedagogum og lærarum frá á sumri í 2011.

Nýggju útbúgvingarnar til lærara og pedagog eru skipaðar soleiðis, at lærarar og pedagogar kunnu taka partar av teimum sum eftirútbúgving.
Millum eftirútbúgvingarnar, sum Læraraskúlin fer at bjóða út tey næstu 2-3 árini eru serlærari, lesivegleiðari, skúlabókavørður, leiðsluskeið og skúlabúgving/innskúling.
Mentamálaráðið vil hava pedagogikum fyri lærarar í miðnámsskúlunum lagt til Fróðskaparsetur Føroya. Læraraskúlin metir seg hava førleikarnar at standa fyri og taka sær av ástøðiliga partinum og at skipa fyri universitetspedagogikum.
Kjarnuførleikin á Læraraskúlanum er innan didaktiska og pedagogiska økið, og hesir førleikarnir eru við til at gera Læraraskúlan serliga væl skikkaðan at standa fyri omanfyri nevndu útbúgvingum.

Útbúgvingarrákið er, at fjarlestur verður alt meiri vanligur, og at tey gerast alt fleiri, sum støðugt menna sín førleikaprofil. Læraraskúlin ætlar innan tvey ár at bjóða partar av sínum útbúgvingum og skeiðum fram sum fjarlestur.

### Trygging av góðsku í útbúgvingunum

Sambært grein 3, 3. stk. í lóg um Fróðskaparsetur Føroya skulu útbúgvingarnar eftirmetast av uttanlands serfrøðingum fjórða hvørt ár.

Próvdómararnir eftir fyrsta lestrarárið í nýggju útbúgvingini vóru lærarar á donskum lærdum háskúlum og universitets collegum. Alt tað fyrsta lestrarárið varð eftirmett av Michael Svendsen Pedersen, lektara á Institut for Psykologi og Uddannelsesforskning á RUC. Eftirmetingin er tikin við í tilrættaleggingini av lestrinum hjá teimum, sum fóru undir lestur í august 2010. Ætlanin er at eftirmeta øll lestrarárini í nýggju útbúgvingini.

## Gransking

Útbúgvingarnar á Læraraskúlanum eru á B.Ed. støði. Harvið skulu útbúgvingarnar vera granskingargrundaðar. Tí er neyðugt, at vísindastarvsfólkini fáa granskingarførleika, og at gransking verður ein grundleggjandi partur av arbeiðsbyrðini soleiðis, sum tað er á øllum universitetum.
Vísindastarvsfólkini skulu hava lokið Ph.D. ella á annan hátt hava nomið sær samsvarandi granskingarførleika. Tvey av teimum, sum nú eru í starvi á Læraraskúlanum, hava nomið sær Ph.D., og ein er í holtur við Ph.D. lestur. Í sambandi við henda seinast nevnda lesturin er ein adjungeraður

professari frá DPU settur í starv á Fróðskaparsetri Føroya við Føroya Læraraskúla sum arbeiðsplássi.

Í løtuni verður granskað innan byrjunarlesing, barna- og ungdómsmentan og siðalæru og lívsáskoðan.
Læraraskúlin ynskir at vera fremstur í Føroyum og javnsettur við stovnar og setur aðra staðni í gransking innan didaktikk og pedagogikk og í koblingini millum didaktikk/pedagogikk og fakøkini, sum annars náturliga hoyra til á Læraraskúlanum. Í hesum sambandi er tað upplagt, at granskingarsamstarv verður við aðrar deildir á Fróðskaparsetrinum. Í M.Ed. tilboðum eigur hetta at vera gjørt, og Læraraskúlin hevur í menningini av nýggju útbúgvingunum verið í sambandi við aðrar deildir at kanna møguleikar fyri skapan av nýggjum fakum.
Málið er, at øll starvsfólk á Læraraskúlanum skulu hava granskingarførleika, og at gransking verður ein týdningarmikil partur av *øllum aktivitetunum* á staðnum. Tað verður ikki roknað møguligt at røkka hesum málinum fyrr enn í minsta lagið um tíggju ár, tasð vil siga, at gransking verur partur av øllum skeiðum og fakøkjum. Ávegis mál er tað, at 3-5 Ph.D. lesandi vera knýtt at skúlanum næstu fimm árini, og at starvsfólk, sum hava annan granskingarførleika enn Ph.D., verða lektaramett. Hetta er alneyðugt at fara undir, um málið at bjóða MA lestur skal røkkast.
Fyrsta professarastarvið á Læraraskúlanum eigur at vera sett í seinasta lagið í 2014.
Farið verður undir nýggjar granskingarverkætlanir í 2010. Eitt amboð at røkka hesum er, at gott og ítøkiligt samstarv verður fingið við granskingarstovnar, ið hava drúgvar granskingarroyndir. Læraraskúlin hevur úr útlandinum fingið áheitanir um granskingarsamstarv, og málið er, at tað í 2010 skal farast undir fyrstu verkætlanina av hesum slagnum.
Læraraskúlin eigur í 2010 at søkja Granskingarráðið um stuðul til í minsta lagið eina granskingarverkætlan. Læraraskúlin eigur í seinasta lagið í 2012 at fara undir fyrstu granskingarverkætlanina, sum verður fíggjað av øðrum. Eitt nú er upplagt at kommunurnar vera við í ætlan, sum hevur við skúlan og stovnsverðina at gera.

## Karmarnir

Umstøðurnar hjá øllum starvsfólkunum at arbeiða á staðnum skulu betrast. Málið er, at øll starvsfólkini skulu hava sítt egna arbeiðsstað. Roknað verður við, at málið verður rokkið í 2011.
Umstøðurnar hjá teimum lesandi skulu betrast. Umstøðurnar til undrivísing eru hampuligar. Tað er alneyðugt at bólkarúm og klyvar til lestur verða fingnir til vega. Mest upplagdi møguleikin fyri hesum er, at Læraraskúlin fær nýtslurætt til hølir, sum Venjingarskúlin nú hevur. Um hetta málið skal røkkast, so er neyðugt at samráðast við Tórshavnar kommunu, ið eigur og rekur bygningarnar á Frælsinum saman við Mentamálaráðnum.
Síðani 2006 er bókasavnið á Læraraskúlanum ment nógv. Dentur eigur framvegis at verða lagdur á at savnið verður ment innan kjarnuøkini hjá Læraraskúlanum. Eisini skal atgongd til talgildar bókmentir og vitan mennast, t.d. við at keypa atgongd til datubásar við ”peer-reviewed” tíðarritum, á teimum fakøkjum, ið eru Læraraskúlanum viðkomandi
Um trivnaðurin hjá teimum lesandi skal økjast, so eigur dentur at verða lagdur á at menna møguleikarnar fyri sosialum virksemi.

## Altjóða samstarv

Møguleikar eru hjá teimum lesandi og starvsfólkum á Læraraskúlanum at taka lut í norðurlendskum

samstarvi. Avbjóðingin viðvíkjandi teimum lesandi er, at tað gongst illa at fáa tey av landinum. Tað kemst av, at mong teirra eru barnabundin.
Í ávísum førum verða skeið hildin á Læraraskúlanum, har tað eru luttakarar úr grannalondum okkara. Enn er einki skeið bjóðað út á eingilskum.

Samstarv er við lærdar lærustovnar í øðrum londum um bæði gransking og undirvísing. Samstarvið skal styrkjast næstu árini, tá ið granskingarførleikin verður øktur.

## Onnur viðurskifti

### Alumni

Óformliga hava starvsfólkini á Læraraskúlanum samband við lærarar og pedagogar, sum eru útbúnir á Læraraskúlanum. Tað er ynskiligt, at hetta verður formaliserað soleiðis, at talan verður um tilboð um vegleiðingar- og íblástrarskeið ella dagar fyrsta og annað árið, eftir at lesturin er lokin.

### Sáttmálaviðurskifti

Í protokolláti millum sáttmálapartarnar, dagfest 11. september 2001, verður sagt, at "arbeiðsbólkur verður settur at endurskoða arbeiðstíð, arbeiðsviðurskifti o. a. á Føroya Læraraskúla, hjá teimum, sum eru sett eftir sáttmálanum. Í arbeiðsbólkinum sita umboð fyri felagið, Lønardeildina, Læraraskúlan og Mentamálastýrið.
Arbeiðsbólkurin verður settur fyri 1. november 2001 og skal vera liðugur við arbeiði sítt 1. mars 2002".

Einki úrslit er komið burturúr hesum protokollatinum. Tá ið tað 1. august 2008 varð farið undir fyrstu royndina í útbúgvingunum, varð arbeiðstíðin útgreinað sambært galdandi sáttmála. Sum skjótast eigur setningurin í protokollatinum frá 11. september 2001 at verða avgreiddur.

Framtíðar manningInnan tvey ár verður roknað við, at samlaða talið á fulltíðar studentum verður 300. Aftrat teimum koma tey, sum fara at taka ískoytisútbúgving, eftirútbúgving og M.Ed útbúgving og teimum, sum fara at at lesa fjarlestur. Samlaða talið verður innan trý ár roknað til 300. Tað vil við øðrum orðum siga, at samlaða studentatalið í 2013 fer at vera 600.

Talið á starvsfólkum – íroknað Ph.D. studentum – verður roknað at fara at vera umleið 40. Tá eru leysalærararnir ikki taldir við